## Jón Rói og Hjalgrím í Italia

Á B71-heimasíðuni vita tey at siga, at tveir av føroysku spælarunum áður hava spælt móti Italia. Jón Rói Jacobsen og Hjalgrím Elttør vóru í 2000 partur av føroyska U18-landsliðnum, sum var í EM-undankappingarbólki við millum øðrum Italia. Ta ferðina taptu Føroyar 6-0 fyri italiumonnum. Venjari var júst Jógvan Martin Olsen, sum eftir dystin segði, at hetta var besta lið, sum hann nakran tíð hevði dystast við. Eingin av italsku spælarunum leygardagin var við á liðnum ta ferðina.



## Leandro spælir í morgin

Gøtumenn hava í hesum døgum 23 ára gamla Leandro Temeroso da Silva til royndarvenjingar í felagnum. Um vikuskiftið verður hann partur av liðnum, tá gøtumenn fara at spæla venjingardyst. Og so verður tað upp til venjaran at gera av, hvørt hetta er maðurin, sum skal styrkja um GÍ-álopið restina av hesum kappingarárinum.

# rnurnar

## Liðini

### Føroyar

| Navn | Felag | Dystir/mál |
|---|---|---|
| **Málverjar** | | |
| Jákup Mikkelsen | B36 | 48/0 |
| Meinhardt Joensen | KÍ | 0/0 |
| **Verja** | | |
| Óli Johannesen | TB | 80/1 |
| Atli Danielsen | Frem | 19/0 |
| Marni Djurhuus | EB/S | 4/0 |
| Jón Rói Jacobsen | AaB | 25/0 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 1/0 |
| Mortan úr Hørg | HB | 5/0 |
| Kári Nielsen | HB | 6/0 |
| Pauli G. Hansen | Skála | 5/0 |
| Bergur Midjord | B36 | 0/0 |
| **Miðvøllur** | | |
| Súni Olsen | AaB | 26/1 |
| Mikkjal Thomassen | B36 | 4/0 |
| Jákup á Borg | HB | 49/2 |
| Rógvi Jacobsen | HB | 42/7 |
| Símun Samuelsen | Keflavík | 9/1 |
| **Álop** | | |
| Andrew av Fløtum | Fremad A. | 21/1 |
| Christian L. Holst | Lyngby | 4/0 |
| Christian Høgni Jacobsen | HB | 33/2 |
| Hjalgrím Elttør | NSÍ | 13/0 |

### Italia

| Navn | Felag | Dystir/mál |
|---|---|---|
| **Málverjar** | | |
| Marco Amelia | Livorno | 3/0 |
| Gianluigi Buffon | Juventus | 73/0 |
| Christian Abbiati | Torino | 30/4 |
| **Verja** | | |
| Andrea Barzagli | Palermo | 13/0 |
| Fabio Cannavaro | Real Madrid | 106/1 |
| Marco Materazzi | Inter | 36/2 |
| Massimo Oddo | Milan | 26/1 |
| Gianluca Zambrotta | Barcelona | 63/2 |
| Alessandro Gamberini | Fiorentina | 0/0 |
| Manuel Pasqual | Fiorentina | 2/0 |
| Max Tonetto | Roma | 0/0 |
| **Miðvøllur** | | |
| Daniele De Rossi | Roma | 26/4 |
| Stefano Diana Aimo | Palermo | 12/0 |
| Ivan Gennaro Gattuso | Milan | 51/1 |
| Simone Perrotta | Roma | 34/2 |
| Andrea Pirlo | Milan | 36/5 |
| Massimo Ambrosini | Milan | 23/0 |
| **Álop** | | |
| Cristiano Lucarelli | Livorno | 3/1 |
| Antonio Di Natale | Udinese | 9/2 |
| Tommaso Rocchi | Lazio | 3/0 |
| Alessandro Del Piero | Juventus | 81/27 |
| Filippo Inzaghi | Milan | 53/23 |
| Fabio Quagliarella | Sampdoria | 1/0 |

## Verður ringt at fáa mál

**Av teimum tíggju leikarunum, sum hava leikt flestar landsdystir fyri Italia ígjøgnum tíðirnar, spæla tveir enn á landsliðnum. Talan er um teir báðar verjuskansarnar, Fabio Cannavaro úr Real Madrid og Alessandro Nesta úr AC Milan**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Eingin ivi er um, at italska landsliðið, sum kom til Føroya í gjár, er fult av stjørnum. Fleiri av leikarunum, sum manna italska liðið, vóru við til at vinna HM-gull seinasta summar, og flestu av leikarunum hava eisini nógvar royndir úr heimligu kappingini, úr evropeiskum kappingum og frá landsliðnum.

Hyggja vit eftir, hvørjir leikarar hava leikt flestar landsdystir fyri Italia ígjøgnum tíðirnar, so finna vit tveir av leikarunum, sum enn eru aktivir. Talan er teir báðar verjuleikararnar, Fabio Cannavaro og Alessandro Nesta. Nesta hevur tó givið avboð til Føroya-ferðina.

Cannavaro hevur leikt heili 106 landsdystir, og hann var liðskipari á italska landsliðnum, sum vann heimsmeistaraheitið. Cannavaro spældi eisini so væl fyri bæði sítt táverandi felag, Juventus, og fyri Italia, at hann bleiv valdur til heimsins besta fótbóltsleikara anno 2006.

Alessandro Nesta er at finna á einum 10. plássi á listanum yvir flestar landsdystir fyri Italia. Eisini hann var við til at vinna HM-gull síðsta summar, men hann var tó skaddar næstan alt endaspælið. Fyri góðum tveimum vikum síðani var hann eisini við til at vinna Champions League-kappingina við felag sínum AC Milan.

### Flestar landsdystir fyri Italia

| | Navn | Dystir | Mál | Fyrsti dystur | Síðsti dystur |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | *Paolo Maldini* | 126 | 7 | 31-03-1988 | 18-06-2002 |
| 2 | *Dino Zoff* | 112 | 0 | 20-04-1968 | 29-05-1983 |
| 3 | *Fabio Cannavaro* | 106 | 1 | 22-01-1997 | 28-03-2007 |
| 4 | *Giacinto Facchetti* | 94 | 3 | 27-03-1963 | 16-11-1977 |
| 5 | *Franco Baresi* | 81 | 1 | 04-12-1982 | 07-09-1994 |
| 6 | *Giuseppe Bergomi* | 81 | 6 | 14-04-1982 | 03-07-1998 |
| 7 | *Alessandro Del Piero* | 81 | 27 | 25-03-1995 | 28-03-2007 |
| 8 | *Marco Tardelli* | 81 | 6 | 07-04-1976 | 25-09-1985 |
| 9 | *Demetrio Albertini* | 79 | 2 | 21-12-1991 | 27-03-2002 |
| 10 | *Alessandro Nesta* | 78 | 0 | 05-10-1996 | 11-10-2006 |

### Flest mál fyri Italia

| | Navn | Dystir | Mál | Mál pr. dyst |
|---|---|---|---|---|
| 1 | *Luigi Riva* | 42 | 35 | 0.83 |
| 2 | *Giuseppe Meazza* | 53 | 33 | 0.62 |
| 3 | *Silvio Piola* | 34 | 30 | 0.88 |
| 4 | *Roberto Baggio* | 56 | 27 | 0.48 |
| 5 | *Alessandro Del Piero* | 81 | 27 | 0.34 |
| 6 | *Alessandro Altobelli* | 61 | 25 | 0.41 |
| 7 | *Adolfo Baloncieri* | 47 | 25 | 0.53 |
| 8 | *Francesco Graziani* | 64 | 23 | 0.36 |
| 9 | *Filippo Inzaghi* | 53 | 23 | 0.43 |
| 10 | *Christian Vieri* | 49 | 23 | 0.47 |